# Tróndarseminar

Át tróndardøgunum verður skipað fyri Tróndarseminari í skúlanum við Gøtugjógv. Heitið á seminarinum er Gøtu-Tróndur og elsta søga Føroya. Tróndur í Gøtu er ein óloysiligur partur av Føroyingasøgu eins og lýsing hansara har er vælkend. Føroyingasøga er tó skrivað umleið 200 ár eftir at hendingarnar fóru fram. Mangt kann verða farið fram hesi 200 árini, og tí er Føroyingasøga neyvan ein heilt neyv lýsing av tíðini, Tróndur livdi í. Við grundarlagi í søguligum, fornfrøðiligum og náttúruvísingaligum keldum, er endamálið á seminarinum at kasta ljós á tíðina, Tróndur var partur av. Á hvørjum søguligum støði virkaði Tróndur? Hvussu vóru Føroyar í samtíð Tróndar, og hvussu sá hetta út í einum størri evropeiskum høpi? Við hesum spurningum í huga er tað sostatt øll elsta søga Føroya, sum verður tikin upp til orðaskiftis á seminarinum. At lýsa hesar spurningar eru ein røð av granskarum, ið serliga hava granskað í Víkingatíðini og eldri miðøld bodnir at luttaka.



*Fyrrverandi landsfornfrøðingurin Sverri Dahl (1910-1987) avmyndaður við inngongdina til Bønhústoftina*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Havleikur

**400 danskærir útlendingar úr øllum norðurlondum eru beint nú samlaði í Føroyum til fólkadansistevnuna, Havleikur, ið samstarvsfelagskapurin, Sláiðring, skipar fyri.**
**– Stevnan eitur Havleikur, tí her er leikur mitt í havinum, sigur Maria Kristiansdóttir, forkvinna í stevnunevndini**

DANSUR

*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Mikudagin var norðurlendska fólkadansistevnan, Havleikur, sett á Vaglinum. Jóannes Eidesgaard, løgmaður setti stevnuna fyri 400 danskærum fólkum úr norðurlondum, ið eru komin hagar at kunna seg um norðurlendskan fólkadans. Hetta er aðru ferð samstarvsfelagskapurin, Sláiðring, hevur skipað fyri hesari dansistevnuni í Føroyum, og 340 føroyingar luttaka eisini. Vaglið gjørdist síðan dansigólv, tá næstan 800 fólk fóru at dansa føroyskan dans.

## Tey eru ovfarin

– Vit hava ikki møguleika at húsa fleiri túsund fólkum, sum hini norðulondini hava, og tí hava vit sett eitt mark á 500 útlendingar, greiðir Maria Kristiansdóttir, ið er forkvinna í stevnunevndini.

– Útlendingarnir eru tó sera ovfarnir av, at vit yvirhøvur megnað at skipa fyri einari slíkari stevnu, tá vit eru so fá og lítil, sigur forkvinnan og sigur frá, at nevndin hevur fingið nógva hjálp frá dansifeløgunum kring landið.

– Fólkadansur er ikki líka útbreiddur í øðrum norðurlondum, sum hann er í Føroyum, og hetta síggja hini londini upp til.

## Vit elska at dansa

– Endamálið er at gleðast um at dansa, skapa samstarv og læra um ymiskar mentanir. Fyrradagin vitjaðu útlendingarnir ymisku dansifeløgini kring landið, har tey fingu kunning og døgurða.

– Um kvøldið dansaðu vit føroyskan dans, og teimum dámdi serliga væl Ormin Langa. Helst norðmenninir hildu tað vera sera áhugavert, at vit visti so nógv um Noregi. Fleiri av hesum útlendingunum koma til Føroya aftur á ólavsøku at dansa føroyskan dans.

– Tá stevana varð sett, fóru vit skrúgongu niðan í Norðurlandahúsið, har vit dansaðu til á miðnátt.

Norðurlandahúsið er býtt upp í trý høli, har ymiskur dansur er hvørt kvøld, meðan stevnan er.

## Kring Føroyar

Útlendingarnir hava verið á útferðum bæði á sjógvi og landi. Teir hava verið á skeiði í føroyskum dansi og fingið fyrilestrar sum føroyskan brúðarsið, føroyskan dans og tey føroysku klæðini. Fríggjakvøld eru tey í Norðurlandahúsinum til sang og fyrilestur um umhvørvið í Føroyum. Á miðnátt vóru tey til miðnáttarguðstænastu í Vesturkirkjuni.

Leygardagin dansa øll runt í býnum í Havn millum klokkan tíggju og klokkan tey. At enda verður veistla leygarkvøldið við nógvum dansi og øðrum góðum.